# Bygdarráðsfundur

## Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 19.07.2021 kl. 17.30

| | |
|---|---|
| Á fundi: | Janus Thomsen |
| | Gunnhild Mortensen |
| | Niels Olaf Eyvindsson |
| | Thorstein Thomsen |
| | Martin í Nesi |
| Ikki møtt: | Eir J. Norðberg |
| | Ronni Hammer |
| | |
| Skrivari: | Johanna B. Djurhuus |

1. **Umsókn um fíggjarligan stuðul frá ADHD-felagnum.**
   Felagið hevur ætlanir um eina royndarverkætlan í 1 ár við ADHD ráðgeva, ið skal ráðgeva kring allar Føroyar.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt ikki at stuðla hesari verkætlan.

2. **Umsókn um fíggjarligan stuðul frá Suðuroyar Norðara Bjargingarfelag.**
   Søkt verður um stuðul til innbúgv til leiguíbúðirnar í húsi felagsins í Nesi.
   **Fíggjarnevndin 19.07.2021:**
   Samtykt varð einmælt at mæla til at stuðla við kr. 10.000,00.
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

3. **Umsókn um fíggjarligan stuðul frá TB-flogbólti.**
   Stuðulsumsókn til kappingarárið 2021/22.
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt at stuðla við kr. 3.000,00 eins og undanfarin ár.

4. **Umsókn um rakstrarjáttan til ávegishús frá Heilbrigdi.**
   Ávegishúsið er ætlað alkohol- og rúsevnismisnýtarum aftaná viðgerð á Heilbrigdi á Velbastað. Rakstrarkostnaðurin er mettur til kr. 19,33 fyri hvønn borgara, um allar kommunur í landinum verða við, ella umleið kr. 13.000,00 fyri Hvalbiar Kommunu.
   **Fíggjarnevndin 19.07.2021:**
   Samtykt varð einmælt at mæla til ikki at stuðla hesum.

**Avgerð:**
Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

5. **Umsókn um fíggjarligan stuðul frá KFUK.**
   Søkt verður um stuðul til 100 ára føðingardag hjá KFUK.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt ikki at stuðla hesum.

6. **Umsókn um stuðul til ráðstevnu frá Alzheimerfelagnum.**
   Felagið skipar fyri ráðstevnu í Norðurlandahúsinum í september og søkir um kr. 20.000,00 í stuðli til hesa verkætlan.
   **Fíggjarnevndin 19.07.2021:**
   Nevndin mælir til at stuðla við kr. 3.000,00.
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt.

7. **Tilboð uppá klæðing v.m. av vitanum í Hvalba.**
   Tvey tilboð eru innkomin uppá at klæða vitan á Leirbø.
   **Fíggjarnevndin 19.07.2021:**
   Samtykt varð einmælt at mæla til at útseta málið til komandi fund.
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

8. **Byggisamtyktin – broyting á korti.**
   Í sambandi við umsókn um byggiloyvi til frítíðarhús á matr. nr. 129d, Hvalba, liggur ognin í umráðisparti B: sethús. Um umsóknin skal gangast á møti, má umráðisparturin broytast frá B: sethúsaøki til I: frítíðarhús.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt ikki at broyta byggisamtyktina.

9. **Ikki almenn mál.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 18.45

Janus Thomsen Gunnhild Mortensen Thorstein Thomsen

Niels Olaf Eyvindsson Martin í Nesi